

*Transocean Rather, sum boraði avmarkingarbrunnar fyri Chevron á Rosebankleiðini í fjør, rakti við olju og gass.*




*Vit síggja loyvini, sum eru latin á landgrunninum. Pílur 1 vísir loyvi 011, sum StatoilHydro enn stendur einsamalt fyri. Tað er her seismiskar kanningar verða gjørdar í summar. Pílur 2 vísir loyvi 008, har Chevron er fyristøðufelag. StatoilHydro eigur 30% av hesum loyvinum. Sosialurin skilur, at tað er nærum heilt vist, at Chevron fer at bora her í Súluprospektinum í 2009. Pílur 3 vísir loyvi 005, sum ENI stendur fyri. Har er avgjørt at bora Anne Marie prospektið í 2009. Fara vit so yvir um markið til píl nr. 4, so finna vit Cambooljufundið, sum verður mett at vera rakstrarverdugt. Og fara vit so longur norðureftir finna vit píl nr. 5, sum vísir Rosebankfundið. Áhugavert er at leggja til merkis, at teir báðir brunnarnir, sum verða boraðir á landgrunninum í 2009 (2 og 3) liggja heilt tætt upp at stórum oljufundum, sum eru gjørd bretsku megin markið (4 og 5).*

# Helst tveir brunnar í 2009

**Tað verða helst boraðir tveir brunnar á landgrunninum komandi ár. Umframt brunn hjá ENI fer Chevron eftir øllum at døma eisini at bora ein brunn. Hesin verður tætt upp at markinum, nærhendis stóra Rosebankfundinum hinumegin markið, sum Chevron hevur ætlanir um at byggja út**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Síðani BP dró "svart" á Williamleiðini fyrr í ár hava øll eygu í oljuverðini verið vend móti tí komandi sjeyndu boringini á landgrunninum, nevniliga henni hjá italska oljufelagnum ENI. Brunnurin á Anne Marie leiðini verður boraður í apríl næsta ár. Nú bendir alt á, at enn ein boring verður á føroyska landgrunninum í 2009. Tað er amerikanska oljufelagið Chevron, sum tað skilst frá álítandi keldum í Aberdeen, ið longu er farið at fyrireika at bora ein brunn í loyvi 008, ið liggur upp at markinum. Tað ljóðar, at Chevron so smátt er farið undir at spyrja um tænastuveitingar til sína fyrstu boring í føroyskum øki nakrantíð. Felagið fekk tillutað hetta loyvi í 2. útbjóðing saman við Statoil, Dong og OMV.

Ein høvuðsorsøk til at Chevron saman við partnarum sínum er farið at leggja eina boring til rættis er sera góðu úrslitini av avmarkingarbrunnum á Rosebankfundinum í bretskum øki beint hinumegin markið. Portalurin veit frá góðum keldum, at úrslitini av teimum seinastu avmarkingarbrunnunum á Rosebankkelduni hava verið so mikið góð, at ein útbygging til framleiðslu nú liggur á tekniborðinum.

Hetta er helst eisini orsøkin til, at Chevron ynskir at seta borin í sítt loyvi føroysku megin markið. Tað hevur verið frammi áður, at keldan á Rosebankleiðini kann halda fram inn á føroyskt øki. Kanningar vísa í hvussu er, at talan er um sera meinlík jarðfrøðilig viðurskifti báðumegin markið.

Vanliga tekur upp til eini 3-5 ár at fremja eina útbyggingarætlan, so skuldi Chevron verið so heppið at funnið olju føroysku megin markið eisini, so kunnu vit ímynda okkum, at ein útbyggingarætlan fer av fevna um økini báðumegin markið. Gongst væl skriva vit 2012 til 2015, tá verulig oljuframleiðsla kann gerast veruleiki í hesum økinum. Chevronsamtakið hevur longu skotið nógv av seismikki í føroyska loyvinum 008. So við teimum góðu úrslitunum í grannalagnum, Rosebank, kundi mangt bent á, at felagið er meira ella minni til reiðar at fara undir at fyrireika boring í næsta ár, soleiðis at hon kann gerast ein náttúrligur liður í allari menningini kring Rosebank og Súluna, sum er prospektið føroysku megin markið.

Rúni M. Hansen, stjóri í StatoilHydro í Føroyum sigur, at sannlíkið fyri, at Chevronsamtakið, har StatoilHydro eigur 30%, fer at bora er rættiliga stórt. Men enn er endalig avgerð ikki tikin.

um tað fer at bora. Tí er greitt, at mong altjóða oljufeløg fylgja sera væl við teimum seismisku kanningunum, sum fara í gongd í juni.

Rúni M. Hansen ynskir ikki at upplýsa, hvussu nógv seismiska kanningin teir fara í gongd við kostar. Men Portalurin veit frá keldum í seismikkumhvørvinum í Stavanger, at ein slík víttfevnandi 3D kanning kostar upp ímóti 200 mill. kr. Hesi tølini tala so fyri, at StatoilHydro sær framvegis møguleikar í Føroyum.

## Risastórt felag

Annars skulu vit nú til at venja okkum til nýggja navnið, nevniliga StatoilHydro. Hetta er so fyrstu ferð, at tað samanlagda felagið ger nakað á føroyskum øki. Sammett við onnur oljufeløg er StatoilHydro vorið eitt rættiliga stórt felag í altjóða høpi. Hetta samanlagda felagið er rættuliga stórt eftirhondini. Felagið er heimsins størsta fyristøðufelag á djúpum vatni. Umleið 30.000 fólk arbeiða í felagnum í 40 londum. Tað framleiðir umleið 1,7 millionir tunnur um dagin og hevur eitt marknadarvirði uppá umleið 600 milliardir kr.

Uppá fyrispurning um ikki henda samanleggingin fer at gera, at StatoilHydro verður enn betri ført fyri at brynja seg út til leiting við Føroyar sigur Rúni M. Hansen, at felagið síðani samanleggingina stendur nógv sterkari. -Alla staðni kring heimin verður nógv orka brúkt uppá oljuleiting og har fer StatoilHydro at standa rættiliga sterkt í tí kappingini. Alt veldst so um, hvussu áhugaverd jarðfrøðin sær út. Komandi seismisku kanningarnar eru so ein liður í at fáa hesa neyðugu vitan sigur StatoilHydro stjórin.